GJALDSTOVAN

Til kommunur og eldrasamstørv

23.12.2015
Journalnr.: 2015 000 33

## Innrapportering av kommunuroknskapum um ársskiftið

Tað, at kommunurnar nú sjálvar kunnu innlesa mánaðarroknskapin, merkir, at mannagongdirnar um ársskiftið verða meira formaliseraðar. Neyðugt er at fylgja ávísum leiðreglum, so valideringarforritini í Kommunuroknskaparinnlesingarskipanini ikki fráboða feil.

Tíðarfreistirnar fyri innlesingarnar um ársskiftið verða hesar:

| | |
|---|---|
| Desember 2015 | innlesast í seinasta lagi 1. februar 2016 |
| Januar 2016 | innlesast í seinasta lagi 1. mars 2016 |
| **Ískoytisskeið 1 2015** | **innlesast ultimo mars 2016** |
| Februar 2016 | innlesast í seinasta lagi 1. apríl 2016 |

Ískoytisskeið 1 2015 skal sostatt verða innlisið, áðrenn roknskapurin fyri februar 2016 verður innlisin.

## Desemberroknskapurin

Desember 2015 skal vera innlisin í seinasta lagi 1. februar 2016, sum ásett í kunngerðini.

## Serlig eftirbókingaravrokning fyri undanfarna ár (ískoytisskeið 1)

Eftirbókingarnar verða gjørdar í sjálvstøðugum avrokningum. Vantar í avrokningini, t.v.s. at tað ikki eru nokk inntøkur at eftirhalda útreiðslurnar í, so leggur landið pengarnar út í hesi avrokningini.Vit miðað eftir, at tað verður gjørd ein avrokning við eftirbókingum, sum verður koyrd ultimo februar 2016. Avrokningin verður skrásett í ískoytisskeiði 1, og er henda heimild sambært kunngerðini.

## Hvat verður tikið við í eftirbókingaravrokningina fyri 2015

Teir postar, sum verða tiknir við í nýggju eftirbókingaravrokningina, eru í høvuðsheitum:

- *Avgjald av kapitaleftirlønum*

-Serflutningsskipan fyri brekað
-Bókasøvn
-Útoyggjastuðul
-Hvíldarheimið Naina
-Gjøld fyri skúlan á Trøðni
-Musikkskúlar
-Kommunustuðul frískúlar
-Frítíðarundirvísing
-Lærlingaundirvísing vinnuskúlar
-Javningar millum kommunur og eldrasamstørv fyri undanfarna ár
-Javningar millum kommunur fyri kommunal samarbeiði fyri undanfarna ár

Umframt hetta skulu kommunurnar innrapportera skattaavsetingina í hesi avrokningini.

Gjaldstovan fer at heita á allar landsstovnar, sum umsita krøv í ískoytisskeiðinum, at fáa tey avgreidd til hesa koyringina.

Sum tað sæst omanfyri, so skulu eftirreguleringar til eldrasamstørv og møguligar eftirreguleringar í kommunalum samarbeiðum verða tiknar við í ískoytisskeiðið. Meira um hetta niðanfyri undir partinum "Serligt um eftirreguleringar".

Ískoytisskeiðið verður markerað í kommunuavrokningini við árinum 2015 og skal verða tikið við í roknskapinum fyri 2015. Meira um hetta undir partinum "Tíðaravmarkingar, sum skulu við í 2015".

# Innrapportering av eftirbókingaravrokningini (ískoytisskeið 1)

Tá ið kommunan hevur fingið eftirbókingaravrokningina fyri 2015, so skal kommunan bóka og innraportera hana ultimo mars 2016. Verður ískoytisskeiðið 2015 ikki innlisið, áðrenn mánaðarroknskapurin fyri februar 2016 verður innlisin, so fara sjálvvirkandi valideringarnar í Kommunuroknskaparinnlesingarforritinum at fráboða feil, tí primofíggjarstøðan verður skeiv.




| StRk | Heiti | Saldo 11-2015 | Saldo 12-2015 |
|---|---|---|---|
| 0330 | Persónsskattur | -2.624.827,23 | -3.142.414,91 |
| 0330 | Húsaleiguskattur | -17.899,11 | -19.249,11 |
| 0331 | Felagsskattur | -7.787.643,27 | -7.794.732,27 |
| 0841 | Kommunuavrokning | -174.107.689,35 | -177.213.005,35 |
| 0842 | Kommunuavrokning, ikki avroknað | 0,00 | 0,00 |
| 0843 | Millumrokning við kommunur (tíðaravmarking) | 0,00 | 1.810.681,00 |
| | Úrslit | -184.538.058,96 | -186.358.720,64 |

Eftirbókingaravrokningin verður tíðaravmarkað á serligari kontu, sum kommunan kann síggja í Leiðslukunningarskipanini, sum tað sæst í myndini omanfyri.

Mótsvarið til hesa kontuna er hjá kommununi standardroknskaparkonta 0367.

Gjaldstovan sendir eina serliga vegleiðing út, tá ið vit fremja hesa avrokningina.

Eitt annað týdningarmikið viðurskifti er, at kommunan tíðaravmarkar rætt. Meira um hetta undir partinum "Tíðaravmarkingar, sum skulu við í 2015".

## Tíðaravmarkingar, sum skulu við í 2015

Sambært roknskaparkunngerðini, so er veitingarløtan avgerandi fyri, í hvørjum roknskaparári ein útreiðsla skal verða tikin við.

Tí skulu útreiðslur fyri t.d. Hvíldarheimið Naina verða tiknar við í roknskapinum fyri 2015, tí veitingin er framd í 2015. Hvørjar útreiðslur talan er um, sum skulu í 2015, er víst í partinum "Hvat verður tikið við í eftirbókingaravrokningina fyri 2015".

## Broyting í roknskaparmeginreglum

Onkrar kommunur tíðaravmarka ikki rætt um ársskiftið, tí tær - fyri onkrar postar - brúka kontantmeginregluna. Hetta skal verða fingið í rættlag í roknskapinum fyri 2015.

Kunngerðin sigur, at tá ið roknskaparmeginreglur verða broyttar - í hesum føri frá kontant til veitingarmeginregluna - so tekur vanliga ein munur seg upp. Hesar tøkniliga treytaðu útreiðslur/inntøkur skulu ikki verða tiknar við sum útreiðslur/inntøkur í játtanarroknskapinum. Í staðin fyri skulu roknskaparpostar fyrst í 2015, nú broytingin verður gjørd, verða tillagaðir soleiðis, at teir vísa ta upphædd, sum teir høvdu havt, um so var, at broytingin varð gjørd frammanundan 2015.

Munurin verður javnaður yvir útjavningarkontuna (eginpeningin). Hetta skal verða gjørt í samráð við Gjaldstovuna, har vit neyvt avtala, hvussu farið skal verða fram. Gott er at hava grannskoðaran hjá kommununi við í hesum arbeiði.

## Nýggjar funkur í Kommunuavrokningini

Tað eru 2 nýggjar funkur í kommunuavrokningini, sum kommunurnar kunnu brúka. Hesar eru avrokningarslag og avrokningarár.

### Kommunuavrokningin savnað í avrokningarsløg

Vit hava savnað alt, sum fer fram á kommunala millumrokningarøkinum, í nøkur "avrokningarsløg", har 3 av teimum verða brúkt í valideringunum av innlesingini av mánaðarroknskapum.

Hesi avrokningarsløg verða brúkt í sambandi við innlesing av mánaðarroknskapum:

**Avrokningarslag 1: Flytingar millum kommunur**

Saldan á hesum avrokningarslagnum, kemur frá Kommunumillumrokningarskipanini (KMR). Saldan á hesum avrokningarslagnum verður brúkt at kanna eftir, um kommunan rapporterar somu saldu, sum landið hevur skrásett.

**Avrokningarslag 2: Millumrokning millum kommunur og samstørv**

Ditto omanfyri, men her fyri millumrokningar millum samstørv og kommunur.

**Avrokningarslag  3: Flytingar millum kommunur og land.**

Saldan á hesum avrokningarslagnum verður brúkt til at stemma av, at kommunan í innlesingini hevur somu nettosaldu fyri millumrokningar millum kommunu og land, sum landið hevur.




Funkan kann verða vald í listanum, sum er markeraður við eini stjørnu.

## Avrokningarár:

Allar avrokningar, sum eru fyri gamla roknskaparárið 2015, verða markeraðar við roknskaparárinum 2015 í valmøguleikanum Verkætlan, sum eisini finst undir listanum, sum er markeraður við eini stjørnu.

Stendur einki í teiginum, so er tað fyri inniverandi roknskaparár.




# Serligt um eftirreguleringar:

## Kommunal samstørv

Tað er tørvur á at gera javningar fyri eldrasamstørvini. Onkrar kommunur skulu rinda meira, og aðrar skulu hava pengar aftur. Hetta verður gjørt í Kommunalu millumrokningarskipanini (KMR). Hesar transaktiónir skulu skrásetast við árinum 2015, og skulu verða avgreiddar í ískoytisavrokningini, sum verður gjørd í mars. Sí meira um hetta omanfyri í partinum "Hvat verður tikið við í eftirbókingaravrokningina fyri 2015".

## Millum kommunur

Eftirreguleringar millum kommunur skulu somuleiðis verða gjørdar um Kommunalu millumrokningarskipanina.

# Gjaldstovan vitja kommunurnar í januar

Gjaldstovan fer at vitja kommunurnar í januar 2016. Vit byrja í viku 3 í nýggja árinum. Vit vit ætla at greiða nágreiniligari frá innlesingum av kommunuroknskapum og formaliseringina av mannagongdunum um ársskiftið.

Eru tit áhugað í tí, greiða vit eisini fegin frá, hvussu Leiðslukunningarskipanin kann verða brúkt í kommununi.

Hevur kommunan serligar spurningar um kontuskipanina, roknskaparkunngerðina ella kunngerðina um kommunalar millumrokningar, so greiða vit fegin frá hesum.

Vit seta okkum í samband við tykkum í nýggja árinum.

Gleðilig jól og gott nýggjár.

Leif Abrahamsen

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | FO-165 ARGIR | FØROYAR | TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO